SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Havi eg lív og heilsuna, verði eg 72, áðrenn val verður aftur, og tá haldi eg, at aldursmarkið er rokkið*

*(Niels Helveg Petersen)*

# Nú eta tey saltaða runu í Haiti

**Nógvastaðni kring heimin eru matvørurnar nógv dýrkaðar, og í tí fátæka Haiti hevur príshækkingin elvt til ruðuleika**

Undir herrópum sum „Vit eru svong og krevja forsetan frá" royndu svangir haitibúgvar at troðka seg inn á forsetaborgina mánadagin, men ST-hermenn steðgaðu álopinum við gummikúlum og táragsssi.

Í gjár vóru haitibúgvar aftur í gøtunum, og hesaferð rændu tey handlar í høvuðsstaðnum Port-au-Prince og øðrum býum. Í seinastuni eru matvørurnar í Haiti vorðnar umleið 40 prosent dýrari, og tað hevur gjørt, at tey flestu hava ikki ráð at keypa mat. Altjóða tíðindastovurnar skriva, at fleiri hava ikki annað til matna enn runu, sum tey koyra eitt sindur av salti og matolju í.

Í Haiti eru fólk ill inn á forsetan og teir 9.000 ST-hermenninar, sum eru har fyri at verja demokratiið. Tey misnøgdu vísa á, at tað kostar ST tvær milliardir krónur um árið at hava hermenninar í Haiti, og kostini hevur ST bara fingið 15 prosent av teimum 455 milliónum krónunum, sum Haiti hevur tørv á í ár.



*Ovurdýrar matvørur hava elvt til harðskap og ruðuleika í Haiti*

*Mynd: Polfoto*

## Siumut vann kommunuvalið

Tað fyrsta kommunuvalið síðan i avgerðina av leggja tær grønlendsku kommunurnar saman var í gjár. Uppstillingin var stórt sæð bara flokspolitisk, og úrslitið varð, at Siumut gjørdist størsti flokkur og fær 34 býráðslimir. Inuit Ataqatigiit gjørdist næststørstur við 18 umboðum, Attassut fekk 15 og Demokratarnir fýra. Til samanleggingina 1. januar 2009 skulu nývaldu býráðini stýra saman við teimum gomlu.

# Lali hevur tvey andlit

**Í indisku heimbygd hennara halda tey, at hinduguðinnan Dunga er endurfødd í Lali**

Lali, sum nú er fýra vikur gomul, hevur tvey andlit eins og rómverski guðurin Janus og hinduguðinnan Dunga. Í heimbygd hennara Saini Sunpura eru øll hunduar, og tey ivast ikki í, at guðinnan Dunga er endurfødd við Lali. AP skrivar, at høvdingurin í bygdini hevur gjørt av at byggja eini serlig hús til smágentuna, og at hann hevur søkt myndugleikarnar í landspartinum um stuðul til byggingina.

Indiskir læknar siga sambært AP, at burtursæð frá teimum báðum andlitunum er Lali sum onnur smábørn.



*Lali drekkur mjólk við báðum munnunum, og hon blunkar við øllum fýra eygunum ísenn*

*Mynd: Polfoto*

**STUTT SAGT**

## Flogfar datt niður

Eitt lítið flogfar hjá vietnamesiska herinum datt niður fyrramorgunin. Myndugleikarnir siga, at fimm heryvirmenn fólk vóru í flogfarinum, og at øll doyðu. Flogfarið var stutt í ein útsynning úr høvuðsstaðnum Hanoi, tá tað brádliga snaraði sær á og datt niður í ein rísakur. Tveir bøndur, sum vóru á rísakrinum, sluppu uttan mein. Vietnamesisku myndugleikarnir hava noktað tíðindafólki at sleppa fram at flogfarinum. Tíðindastovur skriva, at tey seinastu árini eru fleiri flogfør hjá vietnamesiska herinum dottin niður. Helst eru flogførini útslitin, tí yvirhøvur er talan um gomul flogfør úr gamla Sovjetsamveldinum og Eysturevropa.

## Rís góðan prís

Alt ov lítið rís er á heimsmarknaðinum, og tað hevur gjørt, at prísurin á rísi er farin upp ígjøgnum í seinastuni. Heimsbankin sigur, at teir seinastu 14 dagarnar er prísurin á rísi hækkaður umleið 50 prosent. Tað hevur gjørt, at rís hevur ongantíð verið so dýrt tey seinastu 19 árini sum nú. Heimsbankin sigur, at rísgoymslurnar kring heimin eru tær minstu síðani í sjeytiárunum, og tað fer serliga at raka tey fátækastu, sum vanliga eta nógv rís, sigur bankin. Sambært bankanum kemst prísvøksturin á rísi av, at aðrar matvørur eru eisini dýrkaðar, og bankin væntar, at rísprísurin kann hækka eini 40 prosent afturat teir næstu mánaðirnar.

Tað er ikki bara rís, sum er vorðið munandi dýrari enn undanfarin ár. Heimsbankin sigur, at prísurin á hveiti er hækkaður nógv, og at hveitiprísurin er tann hægsti síðani 1980.

